Meginfelag Áhugaleikara Føroya

**Í Hans Andriasarhúsi, 16. februar 2016**

# AÐALFUNDURIN 2016

**Limagjaldið fyri 2016**
**skal gjaldast á konto**
***9181-185.132.4***
**Feløg 1.000,- kr.**
**Bólkar 700.- kr.**

***Góðu felagslimir***

Aðalfundurin verður í **Foyerini í Sjónleikarhúsinum í Havn**

**leygardagin 12. mars 2016 kl. 11.00 -15.00**

Allir limir í limafeløgunum hava rætt at møta á aðalfundinum.

**SKRÁ:**

1. Aðalfundurin verður settur og fundarstjóri og -skrivari valdir
2. Formansfrágreiðing
3. Kassameistarin leggur roknskapin fram
4. Umrøða/góðkenning av formansfrágreiðing og roknskapi
5. Innkomin mál
6. Áseta limagjald
7. Velja nevndarlimir og varalimir
8. Velja grannskoðara
9. Ymiskt

Fyri vali standa nevndarlimirnir Noomi Reinert, Hilmar Joensen og Petur Simonsen og varanevndarlimirnir Rudolf Joensen og Nora Bærentsen. Við øðrum orðum skulu veljast 3 limir og 2 varalimir.

Á aðalfundinum hava sjónleikarafeløg 6 og bólkar 2 atkvøður. Undan fundinum verða tit biðin um at gera av, hvør skal atkvøða fyri tykkara felag/bólki.

Mál at leggja fyri aðalfundin skulu vera MáF í hendi **ikki seinni enn 28. februar 2016.**

Allir limir í MáF, sum hava fylt 18 ár, kunnu vera í uppskoti til nevndarval. **Uppskotini til nevndarlimir í MáF skulu vera skrivlig og kunnu sendast í telduposti ikki seinni enn 28. februar 2016.**

**Hjálagt:**

./. Lóg Meginfelag áhugaleikara Føroya
./. Fundarfrágreiðing frá aðalfundinum 14. mars 2015

***Legg til merkis:***
**Er limagjaldið ikki goldið**
**14 dagar fyri aðalfundin,**
**fellur atkvøðurætturin**
**á aðalfundinum burtur!**

**Blíðar heilsanir**
**f. MáF**

***Ingun Christensen***
*fyrisitingarleiðari*

**MáF** - undir Pisuvarða 2 - postsmoga 185 - FO-110 Tórshavn - Føroyar - tlf. 315624 og 285624
maf@maf.fo . www.maf.fo